## Barca aftur í essinum

Eftir óvæntað tap í Champions League í farnu viku, var Barcelona aftur í rætta essinum í gjárkvøldið. Barca spældi ímóti Real Zaragoza í sponsku landskappingini, og tað endaði við stórsigri til Barca. Í hálvleikinum var støðan 3-0 til Barcelona, og í seinna hálvleiki skoraði Barca trý mál afturat. Zaragoza fekk eitt troystarmál, so dysturin endaði 6-1.



## Babbel ræðist ikki sekkin

Tað hevur gingið illa hjá týska felagnum Stuttgart í hesum kappingarárinum, og venjarin Marcus Babbel sigur, at hann er avkláraður við støðuna, sum hann er komin í. Ein av gomlu vinmonnunum hjá Babbel er ítróttarstjóri í felagnum, og hann skal taka eina møguliga avgerð um at sekkja Babbel. - Eg havi sagt við, at hóast okkara vinarlag, so skal hann passa sítt arbeiði. Eg havi verið við nóg leingi til at vita, at um vit ikki fáa betri úrslit, so má hann gera okkurt, sigur Babbel.

### VÍF-VB 24-16 (11-5):

# VB enn í botni

**VÍF vann tryggan sigur á VB, og slapp sær fyri fyrstu ferð í ár av botnsessinum, har VB og StÍF standa eftir**




Jákup Mørk

Mest sum spildurnýggja kvinnuliðið hjá VÍF vann sunnudagin sín fyrsta sigur í Sunset-kappingini.

VB var komið á vitjan, og fyri bæði liðini var talan um dyst, sum hevði til endamál at toga liðið upp um kriminellur strikuna niðast á talvuni.

Og tað gjørdist VÍF, sum dróg væl longra stráðið í tí dystinum.

Heimakvinnurnar løgdu seg frá fyrsta bríksli á dystin, og tað var sjáldan – um nakranið – at VB fekk gjørt tað heilt stóra við mótstøðuna.

Longu í steðginum var munurin seks mál, og tí leiðsluni slepti heimaliðið ongan tíð. Fyrstu longu løtuna av seinna hálvleiki bar mest sum einki til hjá VB, og hóast tær pyntaðu eitt sindur um seinastu løtuna, so var tað ongan tíð soleiðis, at tær hóttu vertirnar.

VÍF fekk við hesum síni fyrstu stig, og nú bendir talvan á, at tað verða StÍF og VB, sum skulu stríðast í botninum, um enn tær hjá VÍF neyvan kenna seg heilt tryggar.




VÍF vann tryggan sigur á VB, tá botnuppgerð var í Vestmanna sunnudagin

savnsmynd

## Máltindurin, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 37 (3) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 23 |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 23 (8) |
| Jacklin Durhuus | Neistin | 21 |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 20 (4) |
| Liljan Durhuus | VÍF | 18 (3) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 18 (4) |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 15 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 14 |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 14 (3) |
| Marinela Patru | Tjaldur | 13 |
| Halla Midjord | VÍF | 12 |
| Rakul Augustinussen | Neistin | 12 (1) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 11 |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 11 |

| Atlantic Airways-kappingin | | |
|---|---|---|
| Poul Kjartan Dam | H71 | 45 (13) |
| David Edvardsen | Neistin | 39 (9) |
| Sámal Joensen | VÍF | 39 (12) |
| Cristian Preda | StÍF | 37 (4) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 33 |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 28 |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 25 (4) |
| Agnar Joensen | VÍF | 23 |
| Bjarti Hansen | VÍF | 23 |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 23 (6) |
| Høgni Klein | Kyndil | 20 |
| Heini Hanusarson | Neistin | 19 |
| Finnur Hansson | Neistin | 18 (1) |
| Birgir Poulsen | Neistin | 16 |
| Ingi Olsen | Neistin | 16 |

## Hondbóltur

### Sunset-kappingin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 98 | 56 | 42 | 6 |
| 2 Tjaldur | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 106 | 70 | 36 | 6 |
| 3 Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 109 | 92 | 17 | 6 |
| 4 VÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 91 | 124 | -33 | 2 |
| 5 VB | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 58 | 83 | -25 | 0 |
| 6 StÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 60 | 97 | -37 | 0 |

### Atlantic Airways-kappingin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 161 | 139 | 22 | 8 |
| 2 H71 | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 127 | 117 | 10 | 6 |
| 3 StÍF | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 142 | 138 | 4 | 6 |
| 4 Kyndil | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 134 | 136 | -2 | 6 |
| 5 VÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 144 | 138 | 6 | 4 |
| 6 KÍF | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 109 | 149 | -40 | 0 |

## Flogbóltur

### Eik-ligan, kvinnur

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| 2 Dráttur | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 3 | 5 | 4 |
| 3 Fleyr | 3 | 2 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 4 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 5 TB | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 6 KÍF | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 7 ÍF | 3 | 0 | - | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

### Eik-ligan, menn

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 3 | 3 | - | 0 | 9 | 4 | 5 | 6 |
| 2 Mjølnir | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 4 | 4 | 4 |
| 3 Fleyr | 3 | 1 | - | 2 | 6 | 6 | 0 | 2 |
| 4 ÍF | 3 | 0 | - | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |